# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Kristiane Olsen, Klaksvík**, vanliga nevnd Anna, ættað úr Søldarfirði, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í gjár 88 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum, í Betesda hósdagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Betesda fríggjdagin klokkan 13.30. Tey sum vilja minnast Onnu kunnu lata Norðoya Ellis- og Vistarheimi eina peningagávu, konto í Norðoya Sparikassa.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu okkum stóra hjálp og samkenslu, tá okkara elskaði maður, pápi, abbi, langabbi og verfaðir

**Jóhan á Lava**
Klaksvík

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til talara, sang og góð orð í Kapellinum og í Betesda.
Tøkk til Klaksvíkar Sjúkrahús og G3 á Landssjúkrahúsinum.
Tøkk fyri heilsanir, blómur og kransar.
Ein serlig tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldartað her á fold.

*Familjunnar vegna*
**Solveig, Bjørg og Sigrun**

## Ein seinasta heilsan til systurdóttir mína

# Unn Hansdóttir

## ið andaðist 20. apríl, bert 18 ára gomul



Góða allarbesta Unn !!!
Eg siti her við køksborðið og skilji so illa, at heimurin uttanfyri so løttliga fer víðari, sum um onki serstakt er hent, sum um hettar bert er ein hending av so nógvum. Hjá mær kennist tað, sum um alt er steðgað á, og eg skilji ikki, at ikki allur heimurin ger tað sama; nígur niður í djúpa sorg, nú ein tann bjartasta sólstrálan er sløknað fyri eygum okkara.

Góða Unn!! tú ert tann sólstrálan, og eg velji at siga »ert«, av tí at eg eri vísur í, at tín bjarta glæma nú fyllir himmalrúmið í tí æviga staðnum, har tú nú hevur tað so fjálgt og gott saman við tínum kæru, sum longu hava fest búgv har. Í mínari tungu sorg kennist tað so gott og troystandi at vita, at tey fevna og fjálga um teg.

Góða Unn!! Við eitt er heimurin vorðin so nógv fátækari og tómari. Við tínum vinsæla og hjartagóða lyndi fylti tú so nógv, har tú komst á dyr, og tað kendist altíð so gott og gevandi at vera saman við tær. Gløgg og skilagóð vart tú, og nú tú vart vorðin so mikið vaksin, var tað hugaligt at hava eitt prát saman við tær og læra, hvussu væl vitandi tú vart um ymisk lívsins viðurskiftir.

Góða Unn!! tað kennist fullkomiliga meiningsleyst, at tær varð unt so stutta tíð her á jørð, men tað tykist mær, at helst vóru boð eftir tær onkra aðrastaðni frá. Tá eg so hugsi um, hvussu stórt menniskja tú vart, er tað jú heldur ikki so løgi, hóast eg av heilum hjarta hevði ynskt, at tú vart ímillum í okkum í nógv, nógv ár afturat.

Góða Unn!! eg fari at sakna teg ómetaliga nógv, og tað verður tungt at liva víðari í komandi tíðum, men eg troysti meg við øllum teimum góðu og ríku minnunum, eg havi um teg, og at vit einaferð fara at hittast aftur.

Góða Unn!! tú gavst so nógv og slepti ongantíð. Tú ríkaði dagligdag okkara og væntaði onki afturfyri.

Teg, dýrabæra menniskja, goymi eg í mínum hjarta og verji um títt vakra og ógloymandi minnið.

Allarbesta Unn!! Jesus pápi er hjá tær og verji teg.

**Marni gubbi**

**Dagurin**
**26. apríl. Cletus**, deyður umleið ár 90. Cletus ella Anacletus var triði maður á pávastóli eftir Pætur.

13. apríl *giftust* í Havn Jeanne Leosdóttir Poulsen og Mikkjal Holm, bæði úr Nólsoy. Dagurin var hildin saman við familju og vinum.

Føroya Ellisakfør:

# Eirikur Ó. Simonsen nýggjur formaður

Leygardagin 7. apríl 2007 var aðalfundur í áhugafelagnum Føroya Ellisakfør, og nýggj nevnd var vald.

Nevndin hevur skipað seg við Eiriki Ó. Simonsen sum formanni, Hans Korsgaard sum næstformanni, Páll Danielsen sum skrivara, Hans Jákup Michelsen sum kassameistara og Finn Jespersen sum nevndarlimi. Eykalimir eru John Christiansen og Búgvi Apol.

Fyrsta tiltakið hjá nýggju nevndini er at skipa fyri árligu flaggdagskoyringini í Havn.

Føroya Ellisakfør er áhugafelag hjá teimum, ið hava áhuga fyri og alsk til gomul akfør. Felagið var sett á stovn í 1992 og hevur nú 15 ár á baki.



*Nevnd og tiltakslimir í Føroya Ellisakførum: John Christiansen, Páll Danielsen, Hans Jákup Michelsen, Finn Jespersen, Eirikur Ó. Simonsen, Búgvi Apol og Hans Korsgaard*



Les Sosialin so ert tú við